# handVERKARIN

3. ÁRSFJÓRÐINGUR 2006 | BLAÐ NR. 20 | HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Gev gætur

Niðanfyri eru nevnd nøkur viðurskifti, sum hava týdning fyri felag og limir.

### EFTIRLØN

Frá 1. oktober 2006 er eftirlønargjaldið 12%, arbeiðsg./meistari rindar 10% og limur 2%.

### SJÚKRAGRUNNURIN BATI

Sjúkragrunnurin Bati er bert fyri tímalønt. Mánaðarlønt fáa løn, tá tey eru sjúk. Umsóknin skal vera Bata í hendi í seinasta lagi 10. sjúkradagin.

Handverkarin rindar 15 oyru og meistarin rindar 30 oyru av hvørjum tíma í grunnin.

### EFTIRÚTBÚGVINGARGRUNNUR

Handverkarar og meistarar gjalda 10 oyru av hvørjum tíma í eftirútbúgvingargrunnin VITIN. Grunnurin letur stuðul, tá handverkarar fara á skeið. Í fyrsta umfari fæst vanliga dagpeningur frá skúlanum. Hetta verður endurgoldið eftir skeiðið. Ferðaútreiðslur verða afturgoldnar sambært kvittan fyri ferðaseðil/seðlar.

### LÍVSTRYGGING

Limir felagsins eru lívtryggjaðir. Ein treyt fyri at fáa útgjald er, at limagjald ikki er í eftirstøðu. Best er tí at gjalda limagjald við fastari flyting.

Umráðandi er at limir boða frá, tá broytingar eru í limastøðuni.

### LØNARSEÐLAR, EFTIRLØN V.M.

Saman við lønarútgjalding skal vikuseðil fylgja við. Tað er umráðandi at handverkarin sjálvur fylgir væl við lønargjaldi og at eftirlønin er røtt (%) og at hendan verður flutt til Grunnin.

### HVÍLANDI LIMIR

Hvílandi limir gjalda 200,00 kr. um árið, og so fáa teir blaðið „Handverkarin", um teir ynskja tað.

### P-TØL, ADRESSUR V.M.

Tað er umráðandi, at felagið hevur P-tøl og rætta adressu hjá limunum.

### TÍMALØN

Tímalønin er kr. 113,69

**Innihaldsyvirlit:** **síða**


Jørgen Thomsen var stigtakari til Skála Handverkarafelag 3

Skála Handverkarafelag hevur mist nógvan pening í vinnulívinum 4

Okkara fremsti listhandverkari: Jákup Zakarias Andrasson 5



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík

**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent

Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.

Evstamark til komandi blað er 24. november 2006 · **Blaðið er prentað: 31. oktober 2006**

**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.

Telefon 35 48 00 · Fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo.

*Skála Handverkarafelag 45 ár:*

# Jørgen Thomsen var stigtakari



Jørgen Thomsen (1927-1995) var tann, sum reisti málið um stovnan av handverkarafelag á Skála, og varð eisini valdur í fyrstu stjórnina í felagnum.

Jørgen var føddur í Syðrugøtu í 1927. Foreldrini vóru Sára M. úr Syðrugøtu og Hans J. Thomsen av Eiði.

Hann varð valdur á Ting fyri Javnaðarflokkin í Eysturoynni í 1978 og var tingmaður til 1994. Løgtingsformaður var hann 1990-1991, og varð valdur í bygdaráðið á Skála 1958-62 og 1966-70.

Jørgen var sjómaður í fleiri ár, tekniskur leiðari á Nordafar í Grønlandi 1959-64, og var arbeiðsformaður á Skála skipasmiðju 1965-1979. Hann andaðist í 1995.

## Skála Arbeiðsmannafelag

Jørgen Thomsen hevur greitt soleiðis frá fyrstu tíðini hjá Skála Handverkarafelag: Eg var formaður í Skála Arbeiðsmannafelag, og av hesum felag var eg eisini útnevndur til nevndarlim í Føroya Arbeiðarafelag. Hetta er um tað mundið, tá farið varð undir at byggja stálskip her á Skipasmiðjuni.

## Kallaði til fundar

Áðrenn tað hevði lítið verið at tikist við. Um sumrarnar starvaðist eg í Grønlandi, og tá ið eg um heystið í 1960 kom heim aftur til Føroya, søkti Tórshavnar Skipasmiðja eftir sveisarum. Eg søkti og fekk arbeiði, og mundi eg arbeiða einar tríggjar mánaðir har.

*… framhald á síðu 26*



*Á síðstu føroyaferð síni í juli 1969 vitjaði Fríríkkur 9, kongur, og drotning Ingrid á Skála skipasmiðju, tá bygginummar 15 (Norðaldan) var sjósett. Fremst í miðjuni gongur Pauli Joensen, sum tá var borgarstjóri á Skála. Aftanfyri hann eru drotningin og Jørgen Thomsen. Jørgen hevur eitt regnskjól yvir høvdinum á drotningini. Uttast høgrumegin gongur Jákup Fredrik Øregaard, sum helst hevur verið løgtingsformaður tá.*

**_Harald Østerø, formaður í Skála Handverkarafelag:_**

# Felagið hevur mist nógvan pening í vinnulívinum

**Harald hevur verið nevndarlimur í Skála Handverkarafelag síðani 1991, og formaður síðani 1993. Hann er stálskipasmiður, og hevur lært á Skála Skipasmiðju, 1965-69. Um somu tíð, sum Harald í 1965 fór at læra til stálskipasmið byrjaðu 5 aðrir. Teir vóru ímillum teir fyrstu í Føroyum, sum lærdu stálskipasmíð. Á Skála var bara ein farin í hesa læru frammanundan.**





Skála Handverkarafelag fekk góða undirtøku, tá tað varð stovnað í 1961, á fyrsta limalistanum eru limirnir 41 í tali.

Fyrstu árini var felagið sera virkið í vinnulívinum á Skála og á Strondum. Hetta gekk rímiligt fyrstu árini, men seinni misti felagið nógvan pening, sum í fleiri umførum varð settur í P/F Skála Skipasmiðju.

## Skálafossur

Lat okkum fyrst nevna, at á eykaaðalfundi í felagnum í 1970 var til viðgerðar eitt uppskot um at seta pening í eitt partafelag, sum hevði til endamáls at keypa Leiv Hepna, sum var lýstur til tvingsilssølu. Ætlanin var eisini at umbyggja skipið til kraftblokk. Hetta gjørdist ein spennandi fundur, tí tá atkvøtt var vóru 14 atkvøður fyri og 11 ímóti.

*… framhald á síðu 20*

*Jákup Zakarias Andrasson:*

# Okkara fremsti listhandverkari

**Jákup Zakarias Andrasson varð borin í heim á Kjalnesi í Kollafirði 20. februar 1819.**

Jákup Zakarias fekk á ungum árum dyggan løst í ryggin. Hesin skaði var so mikið álvarsamur, at hann eftir hetta, ikki fekk átikið sær vanligt kropsligt arbeiði. Fleiri frásagnir eru um, at hann frammanundan var stórur, væl bygdur og av raskastu monnum til alt arbeiði. Men Jákup vann sær ikki rættuliga heilsuna aftur, og doyði brádliga bert 49 ára gamal í 1868.

### Føroyskt listhandverk

Men hóast tunga lagnu og kropsligar avmarkingar megnaði Jákup at skapa brúkslist og listhandverk á einum støði, sum frammanundan var púra ókent í Føroyum. Hann hevði framúrskarandi listarlig evni, og var fjølbroyttur. Hann megnaði sum ongin annar, at evna til brúkslist úr træi, jarni, silvuri, kopari, messing, mahogni, ibenholt, beini, horni, roði, ull og perlumori. Perlumor fekk hann t. d. úr øðuskeljum.

Jákup var slóðbrótari; hann skapti hevd og tjóðskaparlig symbol, sum føroyingar eins og útlendingar sóu stórt virði í, og sum við tíðini eru vorðin ein partur av føroyskum samleika og eyðkenni. Tí eigur hann eisini pláss, sum fyrsti føroyski listhandverkarin, sum vit í dag vita at siga frá.







*Ingálvur av Reyni hevur ímyndað sær Jákup Zakarias, sitandi við fiólini, sum hann bygdi. Møguliga hevur Jákup eisini verið tónasmiður, prógv eru kortini ikki fyri tí.*

## Samtíðarmenn

Tá talan er um málningalist verður vanliga sagt, at Díðrikur á Skarvanesi var fyrsti føroyski listamálarin. Í hesum sambandi eigur at vera nevnt at Jákup Zakarias og Díðrikur vóru samtíðarmenn. Teir hava tí verið ávirkaðir av sama ráki og teimum møguleikum, sum uppi vóru fyrru helvt av 19. øld.

Díðrikur á Skarvanesi var føddur í 1802 og doyði í 1865.

## Føroyskar ímyndir

Her eigur at vera nevnt at Jákup var tann fyrsti at prýða brúkslist við súmbolum úr føroyskum arbeiðs- og gerandislívi. Hann evnaði til smáar hugtakandi ímyndir (ikon) av t.d. føroyska róðrarbátinum, arbeiðsamboðum, grindahvali og grindareiðskapi.

Seinni vóru aðrir, sum tóku táttin upp eftir hann, og í dag eru „skreytknívar"at síggja í nærum hvørjum heimi í Føroyum. Oftast er talan um „grindaknív", sum fólk hava til prýðis, og sýna fram í stovuni. Í dag er sjálvandi lag á manni, við amboðum og maskinum, at evna til prýðislutir úr træi og jarni, og onkur man tí halda, at tað kanska er ov nógv av tí góða.

## Búsettust á Argjum

Sum nevnt var Jákup Zakarias føddur á Kjalnesi í 1819. Pápin, Andrass Andrasson (1792-1875), var ættaður úr Hvalba, og mamman, Elspa, var úr Kollafirði. Andrass Andrasson var eitt skifti uppsitari á Kjalnesi, sum var náðingsgarður hjá Norðstreymoyarpresti.

Andrass og Elspa keyptu í 1828 gomlu hospitalsognina á Argjum og búsettust har í 1829. Á Argjum bygdi Andrass sær smiðju; hann var góður jarn- og húsasmiður og tiltikin grótmaður.

## Andrass, Elspa og børn

Andrass og Elspa fingu 8 børn, 3 gentur og 5 dreingir. Døturnar giftust av Argjum. Anna (1821-1895) við Pól í Geil í Havn. Lisa (1830-1892) við Atu Jógvani á Nesi og Billa (1825-1899) við Mikkjal undir Reynum á Sandi.

Synirnir Mortan, Dánjal, Niels og Jákup búsettust á Argjum. Teir vóru allir



smiðir. Mortan (1816-1882) var træ- og bátasmiður, Dánjal (1818-1891) træsmiður og Niels (1823-1900) jarnsmiður.

Niklas (f. 1835) búsetist í Ålborg har hann arbeiddi sum smiður og verkførari.

## Niels tók sær av Jákupi

Bróðurin Niels tók sær nógv av Jákupi. Tá hann bygdi sær hús á Argjum, bygdi hann so mikið stórt, at Jákup eisini fekk rúm at arbeiða í.

Í hesum sambandi eigur at vera nevnt, at Niels fór til Danmarkar at læra til smið í 1844. Hann lærdi á skipasmiðjuni hjá Kaspersen í Keypmannahavn. Sveinastykkið var ein kistulykil við skeggi. Frásagnir siga, at Niels var við til at leggja ta fyrstu jarnbreytina millum Keypmannahavn og Roskilde.

## Ein ættarsøga

Niels Juul Arge skrivar í bókini „Argjamenn – ein ættarsøga“ um Jákup Zakarias: Hann fór undir lætt arbeiði og smíðaði ketlar, tubbaks- og skrádósir, urkassar, fýrføt og mangt annað. Sum frá leið gjørdist hann djarvari, og smíðaði silvurbolla og pípustokk. Hann var enntá so djarvur, at hann smíðaði eina fiól. Nógv vóru tey, sum undraðust á, at hann var førur fyri at leggja slíkt arbeiði úr hondum. Hvar fiólin endaði, vita vit ikki, men vit hava varhugan av, at hon varð send niður á eina framsýning.

*… framhald á síðu 9*



# Remote back-up til virkir

**10 gb.**

**299 kr. um mánaðin**



## Lít á okkum

Info@elektron.fo ella 345 100

Elektron

*Stephanssons Hús*

… framhald frá síðu 7

## Skefti knívar

At skefta knívar við mahogni og gera slíðrar av sama tilfari, og prýða teir, fyrst við motivi úr spælikortum, seinni við báti og grindareiðskapi, var Jákup undangongumaður. Fyrst legði hann kopar og messing í mahogni, síðan ibenholt og perlumor. Hann legði eisini silvur í mahogni og nýtti onnur motiv, t.d. dunnu.

Sprettiknívar við kellingaskafti gjørdi hann eisini og legði perlumor í skaftið.

## Forskerarasett

Tá ið hann gekk frá mahogniinum, fór Jákup at nýta ibenholt til skaft og slíðrar og legði kopar og perlumor í.

Seinni býtti hann koparið um við messing. Sera fermur var hann í eldinum, smíðaði til dømis forskerarasett, sum hann skefti og gjørdi slíðrar til og legði perlumor í. Forskerarasettið, sum er avmyndað á forsíðuni, hevur Jákup Zakarias gjørt.

Prestar, læknar, fremmandir ferðamenn og skiparar á útlendskum skipum, sum fiskaðu undir Føroyum, vóru grammir at keypa skreytlutir frá Jákupi. Onglendingar vildu helst hava grindaknívar.

## Annað arbeiði

Onnur ting, sum hann evnaði til, vóru hekti og mallur úr messing til konufólkaklæði. Í varðveitslu er framvegis ein tummastokkur úr ibenholt, eitt korter til longdar. Tølini, hann legði í, evnaði hann til úr messingtráði.

Skuldi maður hava innsigli (signet), so var bara at senda boð til Argir til Jákup. Hann gjørdi tey, annaðhvørt



eggklingrut ella áttakantað. Knapparnar gjørdi hann úr mahogni ella ibenholt. Gotiskir stavir vóru høgdir í signettini. At miða seg eftir hevði hann eina ABC bók.

## Talvfólk

Sum aðrir her á landi telgdi Jákup eisini talvfólk. Hann hevði ein evarska lítlan knív at telgja við. So væl vóru talvfólk hansara umtókt, at eini vórðu send til Paris til framsýningar. Haðani eru tey afturkomin. Av Argjum fóru tey við einum Norðmanni. Um talvfólkið verður sagt, at tvey av teimum høvdu fjøður í hatti, og rókurin hevði flatan hatt.

Kumpassir funnust eisini á verkstaði hansara. Um hann gjørdi tær ella vældi um tær, vita vit ikki.

## Bókbinding

Bókbinding tókst hann eisini við, og til tess hevði hann bókbindaraamboð. Tey

… framhald á síðu 12




www.sansir.fo

Tað er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways. Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil. Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.

Gjaldkort, sum kunnu nýtast: Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club.

ATLANTIC AIRWAYS

www.atlantic.fo


Ein góð byrjan
Er grundarlagið í lagi? Timburhandilin og 2x3 ynskja at bjóða tær eina góða byrjan við einum breiðum og góðum úrvali av Mascot arbeiðsklæðum og DeWALT amboðum.
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir
PÓLAR

*… framhald frá síðu 9*

komu við lestrarbókum og bóðu hann binda inn. Hann hevði plógv at skrúva bløðini saman við.

Permuna skar hann úr barkaðum roði. Fetlarnar gjørdi hann við messingkróki í og smurdi teir blankar. Hann skrivaði úr bókum við blekki. Tey komu til hansara at biðja hann skriva tær við prentstavum.

## Útróður

Áðrenn Jákup Zakarias gjørdist sjúkur, var hann tann raskasti av synunum hjá Andrassi, sum henda søga boðar frá. Eitt summarið var nógv at fiska, og teir róðu út dag um dag allir fýra brøðurnir Mortan, Dánjal, Jákup Zakarias og Niels. Tann eina dagin hevur Jákup ikki hug at fara til útróðrar, tí henda dag skóru teir á hvørjum ári torv fyri Müller, ein mannskurð hvør. Morgunin eftir vekja teir ikki Jákup, men fara tríggir til útróðrar. Hetta dámdi Jákupi illa, tí hann hevði komið við teimum, hóast hann ikki var samdur við teir.

## Eitt bragd

Hann fór so suður á Glyvursnes tíðliga á morgni, og kom ógviliga seint aftur. Segði bara, at hann hevði verið og skorið fyri Müller. Tá ið streymurin harðnaði, fara hinir tríggir ein dag suður á Glyvursnes og skulu skera sín mansskurð. Men nú var verri vorðið. Jákup hevði skorið allar fýra, og teir so snópnir aftur til hús. Jákup fer so einaferð heim til Müller at klára upp fyri sín mansskurð. Nei, Jákup góði, helt Müller fyri, tú hevur skorið allar fýra, og tú skalt hava lønina fyri allar. Og so varð. Tað varð leingi tosað um Argjamannin, sum var so raskur í sínum ungdómi, og sum heilsan fór so illa við.

## Heimafturkomnir lutir

Jákup livdi ikki væl í seinastuni, men hvørja løtu, hann var so frægur, putlaðist hann við okkurt. Árið fyri, sum hann doyði, gjørdi hann systrini Lisu ein felliknív úr messingi. Í skaftið høgdi hann stavirnar MES og árið 1867. Systirin æt Maria Elisabeth Sofía. Knívurin er í varðveitslu á Nesi.

Tíverri fór so at siga alt, sum hann evnaði til, av landinum. Nakrir fáir lutir eru heimafturkomnir, men ov fáir til at vit kunnu fáa eina heilskapaða mynd av tí, hann legði úr hondum. Soleiðis skrivar Niels J. Arge um Jákup Zakarias.

## Ídnaðargerð skapar nýggjar møguleikar

Longu fyrst í 19. øld fær ídnaðargerðin í Evropa stóra ávirkan á føroyska samfelagið. Tá fingu føroyingar møguleikar, sum teir ikki høvdu haft frammanundan. Føroyska samfelagið var eisini blivið so mikið opið, at føroyingar sluppu av landinum t.d. at fáa sær handverksútbúgving.

Henda møguleika fingu tveir av synunum hjá Andrass Mortanson, Niels og Niklas. Teir fingu báðir handverksútbúgving í Danmark.

## Gomlu handverkini

Í sínum arbeiði hevði jarnsmiðurin nógv amboð, sum hann eisini sjálvur gjørdi: hamrar, tengur o.s.fr. ja enntá stiðan, sum alt var smíða á.

Fram um alt smíðaði jarnsmiðurin knívar, sum var høvuðsamboð føroyinga, og sum hvør maður fyrr altíð



hevði undir lið. Øll kenna vit máliskuna „knívleysur maður er lívleysur“.

Við knívinum ótu teir, svævdu seyð, stungu oksar, skóru hval á háls, flettu, skóru upp og limaðu sundur. Og væl bar til, tí allir høvdu teir frá barnsbeini lært at halda knívi og lært, hvar ið teir skuldu seta á.

Tó at onnur amboð eisini vórðu nýtt, so var knívurin álitið í so mongum arbeiði hjá træsmiðinum og smásmiðinum. Við knívinum hava summir fingið í lag at telgja skrúvur og skrúvugongd. Tað er heldur einki annað amboð, sum mannfólkini hava vandað sær so um, sum um knívin.

## Knívsblaðið

Blaðið á øllum knívum var øðrvísi sneitt enn á knívum, vit annars vita um í øðrum londum, og tað er neyvan tilvild, men úrslit av royndum.

Skaftið á knívum til gerandisbrúk var oftast av tilvildarviði, og slíðrarnir úr leðri ella úr viði við hornhólkum, færri og fleiri.

Á knívum, sum skuldu bjóða sær betur fram, vóru skøftini av mahogni og teak ella øðrum frægari viði.

Eisini hava teir havt serligar skartknívar, ið vórðu innlagdir við ljósari og myrkari viðasløgum, stundum við myndum úr metal, seinri fara teir at gera knívar og slíðrar úr ibenholt við innløgdum silvur- og beinamynstrum og myndum, ella gera teir úr hvalabeini við metalhólkum

## Fjallstavurin

Eitt annað amboð, sum tað altíð hevur glett menn at fríðka um, er fjallstavurin.

Niðast hevur hann langan jarnpík, ofta við hegnisliga smíðaðum veðrum, sum vóru til gagns og prýðis. Við ovara enda er altíð eitthvørt serligt gjørt. Hann kann enda í knøtti, er oftast skreytskorin við krot- ella myndaskurði, ella við svidnum myndum.

Serligan ómak gjørdu summir sær við fríggjarastavinum, sum skuldi vera so langur, at maður røkk at leggja fingrarnar á toppin, tá píkin stóð á fótablaðnum.

## Krotskurður

Krotskurður er annars serliga á størri og smærri kistlum, ið ofta eru bæði snøgt og stuttliga gjørdir. Við hvørt eru teir úr

… framhald á síðu 16


SISU
Ein drykkur við drúusukri ið stimbrar vöddar og heila.


TÓRSHAVNAR KOMMUNA
Nær er kommunala brennistøðin opin?
Skriva rusk í einum sms og send til 28 50 00
Tú fært svar beinanvegin!


FØROYA BETONG SAGING
www.betongsaging.fo
Føroya Betongsaging
FO-620 Runavík
Faroe Islands
Telefon: +298 44 75 43
Fartlf.: +298 21 75 43
Fax: +298 44 88 98
E-mail: fobetsag@post.olivant.fo
Pf. Einars Prent · 31 49 29

# HÚSASMÍÐ

**Finnur Simonsen**

tel. 31 45 49 - 51 45 49 - fax 31 83 81

Málarameistararnir

# FALKENBERG

Tlf. 21 31 51 Tommy

Tlf. 21 31 54 Benny




SKIPASMIÐJAN

*Skipasmiðja síðan 1936*

… framhald frá síðu 13

einum kubba. Næstan allir kistlar eru at læsa, summir við kynstrigum lásum, naddalásum, finnalásum ella nýralásum, ið ein og hvør ikki fekk upp.



Ískornar eru eisini flestar manglifjalirnar, festargávur frá dreingi til gentu; á teimum síggja vit hendinga ferðir blaðskurðverk. Og handfongini á øllum eru hjá okkum sum hjá øðrum evnað sum ross ella drekar. Sjáldsamar eru rættiligar myndir, men koma fyri bæði á manglifjalum og á kistlalokum. Ein kistil á Fornminnissavninum frá 1695 hevur rúnainnskrift.

## Horn

Til smásmíð sítt høvdu teir umframt viðin serliga horn. Úr tí gjørdu teir serstakliga súpingarbúnýti, sum hvør skuldi eiga sítt av; spønir við stuttum uppbendum skafti, og rundum ella árundum blaði, og skeiðir við longri skafti og vanliga spískari blaði. Besta evnið var neytahorn, tey vórðu sagað áleiðis og annaðhvørt kókað ella bloytt í loga, síðan løgd í spónalag, ið var læst við eini hornheld. Á henda hátt fekk spónurin tað skap, hann skuldi, men mátti nú verða telgdur og skavaður við serligum knívum og so snákaður og blankaður á ymsan hátt, til hann varð skínandi og mjúkur. Hesir spønir eru summir útskornir og stundum valaverk.

Úr horni gjørdu teir eisini kambar, serliga tættkambar, lúsakambar; hornið varð sett í kambalag og har evnað við smáum sagum og knívum. Serliga stór horn vórðu gjørd til brennivínshorn, snúshorn og krúthorn, og av stiklunum vórðu gjørdir svøvlar.

## Stoypiformar

Stoypingaformar gjørdu teir úr royðugróti ella fitisteinspettum, sum við hvørt skilliga siga frá, at tey eru ílatabrot, ið gjørd eru til formar. Hvussu teir hava fingið tey, er ikki gott at siga nú,

men óhugsandi er ikki, at menn hava funnið tey í gomlum toftum. Teir stoyttu mest tin: skeiðir, spenni, buksu-, troyggju- og stimaknappar og annað, úr blýggj stoyttu teir kúlur og pilkar. Summir hava roynt seg í fínari metalsmíði, til skjals eru silvurskeiðir og fittir silvurbollar, sum føroyskir silvursmiðir skulu hava smíðað, umframt eru skrá- og tubbaksdósir, úr kopari og messing, summar við loynilásum; sumt av hesum sigst at vera evnað her á landi, um so er, óivað eftir fremmandum fyrimyndum. Pípustokkar tykjast hava verið rættiliga vanligir, fleiri eru væl gjørdir úr serliga góðum viði og hava metalhólkar, ein sovorðin er um somu tíð stavur, pípugoymslan er í handtakinum.

## Sparsemi kann vera dygd

Føroyingar hava altíð lagt dent á at vera væl og hampiliga skøddir og klæddir, eins og teimum tókti væl at vera siðaðir í allari medferð, – og menn vórðu virdir eftir tí. At spara vóru teir noyddir, men slík sparsemi, sum í roynd og veru er røkiskapur og sketni, er dygd hjá einum fólki.

At smíða øll ella flest øll amboð sjálvur, soleiðis sum gjørt varð, hevur verið slíkt knoss, at vit nú á døgum illa duga at fata tað.

Tað var vanligt, at maður sjálvur laðaði og smíðaði hús síni, sethús og mongu úthúsini. Onkur hevur helst havt royndan smið sum ráðgeva, ella at smiður stóð fyri arbeiðinum hóast eigarmaðurin sjálvur gjørdi meginpartin av arbeiðinum.

Her kundu vit nevnt eina stutta frágreiðing hjá Mikinesmanni. Hann sigur soleiðis: „At verða biðin um at smíða hús, tað hildu vit vera fragd. Ein og tjúgu ára gamal tók eg sjálvur triði fyrstu húsini uppá meg at gera, bæði laða grundina og smíða tey, tað var í 1887, og væl bar í lag, tó eg ikki hevði smíðað fyrr, men altíð havi eg lagt mær eina við at hyggja væl eftir, hvussu hinir smíðaðu" (M. Skylv Hansen 1950).

## Kola

Lýsikolan var einasta ljósamboðið í føroyskum heimum næst eftir kertuljósi til út ímóti 1900.

Kolan á myndini niðanfyri hevur undirkolu.

Rakið, veikurin, kundi draga meira lýsi í seg, enn login brendi. Tá kundi dryppa niður í undirkoluna.

Veikurin var úr veikagrasi. Summar bygdir, sum ikki høvdu rívan av veikagrasi, fingu tað úr øðrum bygdum. Dømi er um bygd, sum lat veikalamb til aðra bygd fyri veikagras.

Lýsi av hvali og fiskalivur var brennievni. Kolan kundi í mesta lagi lýsa við 4 rakum, einum í hvørjum horninum.



# Hvat gert tú við tínar pengar

Kundi tú hugsað tær at vita, hvørjar møguleikar tú hevur?
Kom inn til okkara og fá eitt prát. Í felag finna vit útav, hvørjar íløgur hóska tær best. Tað er einfaldari, enn tú trýrt.




sansir.fo - 11/2005

# AGA Føroyar - Føroya Gassøla

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarar:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing
- **ESAB:** Elektrodir og sveisiútgerð

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo






Mynd tikin niður í dokkina í 1995. Fremst Vesturvarði; aftanfyri, lið um lið, tveir kubatrolarar.



Ocean Castle í dokk (bygginummar 53; latið í 1989). Skipið hevur havt ymiskar eigarar og ymisk nøvn, t.d. Napoleon, nú eitur skipið Fríborg.

Tá setti felagið 100.000,- kr. í P/F Vál, sum keypti og umbygdi Leiv Hepna; hann fekk tá navnið Skálafossur. Í 1977 seldi P/F Vál skipið, sum tá fekk navnið Havlot. Her kann leggjast afturat, at limagjaldið hækkaði til 4% fyri at gjalda lánið fyri Skálafoss, og 100.000.- kr. vóru nógvir pengar í 1970.

## Sveisarar

Í 1973 varð samtykt at lata sveisarar gerast limir í felagnum. Ein samtykt verður gjørd við ymiskum rættiliga krevjandi treytum fyri, at sveisarar kunnu gerast limir. Ein av treytunum var, at teir í minsta lagi skulu hava arbeitt við skipasmíð og sveising í 4 ár. Seinni er hetta broytt til 27 mánaðir. Sigast kann at menn vóru rættuliga ivasamir. Kanska átti ein deild at verið í Handverkarafelagnum fyri sveisarar, sum hava stytta lærutíð.

## Íløgur í Skála Skipasmiðju

Árið 1972 royndist illa hjá P/F Skála Skipasmiðju. Í desember 1972 gjørdist greitt, at varð partapeningurin í felagnum ikki hækkaður, so fór skipasmiðjan av knóranum. Mest sum allir limirnir í Skála Handverkarafelag arbeiddu á skipasmiðjuni, og tí var vandi fyri at teir allir gjørdust arbeiðsleysir. Tí varð inn-

Mynd tikin í 1993 av brúgvatakinum á Kapitan Bubnov, sum var í dokk. Skipið er 120 metrar langt og 19 metrar breitt. Á myndini (høgrumegin) er bygningurin, sum Skála Handverkarafelag keypti fyrst í hesum árinum.



kallað til eykaaðalfund í Handverkarafelagnum 28. desember 1972, og uppskot lagt fyri limirnar um at seta pening í Skipasmiðjuna. Sigast má, at áhugin millum limirnar, ið vóru møttir, var stórur, tí tá atkvøtt var um at seta 300.000,- kr. í P/F Skála Skipasmiðju, atkvøddi ongin ímóti. Umframt Handverkarafelagið settu tá eisini fleiri onnur feløg og kommunur pening í Skipasmiðjuna.

## Settu 1,956 mill. í Skipasmiðjuna

Í 1980 vóru aftur fíggjarligir trupulleikar á Skipasmiðjuni. Tá var neyðugt at hækka partapeningin munandi. Tí varð aftur skipað fyri eykaaðalfundi um Skipasmiðjuna. Og eisini á hesum sinni vístu limirnir áhuga; samtykt varð at hækka partapeningin við 1,2 mill. kr. Tað bjargaði Skipasmiðjuni í 1980.

Í 1983 hækkaði Handverkarafelagið partapeningin í Skipasmiðjuni við 456.000,- kr. Tá átti felagið tilsamans 1,956 mill. kr. í P/F Skála Skipasmiðju, sum var eitt tað størsta arbeiðsplássið í landinum.

## Bátafisk og Turkihúsið

Í 1984 vísti tað seg at vera áhugi millum limirnar at seta pening í P/F Bátafisk á Strondum, og á fundi 16. apríl varð gjørt av at seta 50.000,- kr. í P/F Bátafisk.

Og á eykaaðalfundi 23. november 1984 var samtykt at seta 50.000,- kr. í P/F Turkihúsið á Skála. Bæði feløgini fingu seinni fíggjarligar trupulleikar, og felagið misti partapeningin í báðum feløgunum.

## Misti allan partapeningin

Á várið 1989 fór P/F Skála Skipasmiðja á húsagang; tá var felagið ikki sinna at seta meira pening í Skipasmiðjuna. Tí steðgaði eisini alt arbeiði, og Skála Handverkarafelag misti allar sínar ognir í skipasmiðjuni, og omanfyri 100 handverkarar gjørdust arbeiðsleysir.



*Bygginummar 16 ferð úr barkastokki. Skipið varð latið eigarunum, Skipafelagið Føroyar, í 1970, og fekk navnið Lómur. Hesin Lómurin sigldi á land á Glyvursnesi. Tá varð hann umvaldur á Skála skipasmiðju. Lómurin, ið nú er í sigling, varð bygdur í 1978/79.*

*Áslakur Johannesen, Funningsfirði, við eina skerimaskinu á skipasmiðjuni, mynd tikin í 1995.*




elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


Finskir ketlar
orkusparandi dygd
P/F Maria Poulsen
á Hálsi · Tel. 312 000


Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92
Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

**rør-tænastan**
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

*Eyðfinn Hansen*
*Box 1106*
*FO-110 Tórshavn*
*Faroe Islands*
*tel./fax: +298 32 81 80*
*fartel.: +298 22 81 80*
*e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo*

**Eykalutir**

- til flest allar bilar!

**ama**

Landsins størsta
goymsla av
eykalutum til bilar

Postboks 3061
Fo-110 Tórshavn,
tel 31 3816

Tað ræður um nøgd viðskiftafólk

STATOIL





*Sylverius Jacobsen, smiðjumeistari, frammanfyri skrúvuna á Enniberg, uml. 1998.*

Tríggjar mánaðir seinni var aftur farið til verka, tá hevði eitt nýtt felag, P/F Skipasmiðjan Føroyar, keypt skipasmiðjuna.

Men í 1997 fekk P/F Skipasmiðjan Føroyar fíggjarligar trupulleikar. Tá var kortini skjótt atborið, mest sum onki arbeiði steðgaði, og nýggir eigarar keyptu skipasmiðjuna.

Síðani hevur støðugt arbeiði verið á skipasmiðjuni, men starvsfólkatalið er nógv minkað. Tá virksemi var í hæddini vóru omanfyri 150 handverkarar til arbeiðis á skipasmiðjuni. Í mai 1985 hevði felagið 153 limir. Í dag man talið av handverkarum, sum arbeiða á skipasmiðjuni, liggja nakað omanfyri 30.

## Grunnur

Í 1978 var samtykt at seta á stovn ein verkfalsgrunn, og fyri fyrst at seta 200.000,- kr. í grunnin. Grunnurin hevur í dag eina rættuliga stóra upphædd at ráða yvir.

5 ára føðingardagstilboð
hvørja viku fram til jóla

# Alt hetta fyri einans

Kall 5 ára tilboð

**2.995,00**

Vanl. prísur 3.688,00




## Nokia 5500-Sport

Telefonin til tann virkna! Fartelefonin hevur forrit, sum heldur eygað við tíni venjing, eitt nú venjingar- úrslitum. Eisini hevur MP3-spælara, FM-útvarp og myndatól við 2,0 megapikslum.



## 512MB Micro Sdkort

Fatelefonin verður sum ein geymi. Pláss er fyri 512MB til tín at leggja inn, hvat tú vilt.



## Headsett Nokia HS-54W

Bluetooth tráleyst headsett, so tú kanst arbeiða við hondunum, samstundis sum tú tosar

kall

20 20 20

kall HANDILIN

Tórshavn Óðinshædd • SMS Klaksvík Klaksvíksvegur 57 Saltangará Heiðavegur 32
www.kall.fo

Tilboðið er galdandi í Kall Handlinum so leingi vøran er á goymslu



*Høgni Houmann, nevndarlimur. Høgni er maskinsmiður og maskinmeistari. Lært á Tórshavnar Skipasmiðju, 1992-96.*



*Janus Uldall, næstformaður. Janus er rørsmiður, lært hjá H. M. Reinert í Havn, 1971-74.*

… framhald frá síðu 3

Men eg merkti rættuliga skjótt, at tað var óheppið, at eg ikki var limur í nøkrum handverkarafelag, og tí tók eg stig til at kalla saman til fundar her á Skála um at stovna eitt handverkarafelag.

## Havnar Handverkarafelag

Eg hevði fingið Alfred Hofgaard, sum var formaður í Havnar Handverkarafelag, at koma við á fundin at greiða frá ymiskum í sambandi við stovnanina av slíkum felag.

Ein deild hevði verið undir Føroya Arbeiðarafelag, sum skuldi verja áhugamálini hjá handverkarum. Men hendan deildin bert minkaði, við tað at handverkarafeløg so við og við verða stovnað runt um í landinum.

## Arbeiðsgevararnir bangnir

Tá ið kallað varð saman til fundar í 1961, arbeiddu longu fleiri mans her sum handverkarar, tó uttan nakað sveinaprógv.

Hesin trupulleikin varð loystur á tann hátt, at sett varð ein freist, har tú so kundi gerast limur við váttan frá arbeiðsgevara, at tú hevði starvast sum handverkari.

Felagið møtti ikki nakrari vælvild í fyrstani. Tað tyktist, sum um arbeiðsgevararnir vóru bangnir fyri, at ólag fór at koma í býtið av arbeiðinum millum arbeiðara og handverkara, og tí gekst eisini sera trupult at fáa ein sáttmála í lag við Skála Skipasmiðju.

## Lýsing í Útvarpinum í 1964

Á einum aðalfundi tann 8. januar 1964 varð viðtikið at lýsa í Útvarpinum, at var eingin skrivlig játtan um gerð av sáttmála komin frá Skála Skipasmiðju innan 9. januar á middegi, so skuldi verkfall lýsast at verða 10. januar.

Tá ið hendan lýsingin hevði verið í Útvarpinum, kom rættilig gongd á, tí nú ringdi Evald Kjølbro út higar fyri at spyrja, hvat var á vási.

## Fundur og sáttmáli

Tosað hevði ongantíð verið við hann,

bert við Sofus Thomsen, sum var deildarleiðari á Skipasmiðjuni, sum P/F J. F. Kjølbro tá átti.

Evald avtalar við stjórnina um at møtast til fundar í Havn. Hetta varð so gjørt. Fyri P/F J. F. Kjølbro møttu Evald Kjølbro og J. Mikkelsen. Á hesum fundinum varð samtykt at gera ein sáttmála millum partarnar.

## Eingin ósemja

Eingin ósemja var um stovnanina. Ein grundin var kanska tann, at ein av stovnarunum av Handverkarafelagnum og formaðurin í Arbeiðsmannafelagnum var ein og sami maður (blst. Jørgen Thomsen), sostatt komu teir skjótt ásamt.

Jørgin Bech gjørdist fyrsti formaður í felagnum, og var tað í heili 14 ár. Hann hevur greitt soleiðis frá, hvussu tað var, tá felagið varð stovnað:

„Undirtøkan var sera góð at fáa felagið sett á stovn, og tað var heldur eingin ósemja við Arbeiðsmannafelagið, sum nú misti rættiliga nógvar limir."

## Trupult at fáa viðurkenning

Tað gjørdist heldur trupult at fáa eina viðurkenning frá arbeiðsgevarunum, sum í hesum føri var Skála Skipasmiðja við Sofus Thomsen sum deildarleiðara, og var grundgevingin hjá Sofus tann, at hetta var í einum sáttmálaskeiði, og sáttmálin var eisini góðkendur av Føroya Arbeiðsgevarafelag, har Skála Skipasmiðja eisini var limur í, og hann metti, at hann sjálvur kundi fáa trupulleikar av hesum.

Sofus Thomsen helt eisini, at tað kundi verða ein tvídráttur millum handverkarar og arbeiðsmenn, við tað at tað ikki altíð var so lætt at siga, hvat arbeiði handverkararnir áttu at gera, og hvat arbeiði arbeiðsmenninir áttu at gera, og hann vísti eisini á ein gerðarrætt, sum varð dømdur í tráð við hetta sama millum Arbeiðsgevarafelagið og Skipasmiðjuna.

Skála Skipasmiðja var eisini limur í Føroya Handverksmeistarafelag.

*… framhald á síðu 30*

*Robert Joensen, nevndarlimur. Robert er maskinsmiður, lært á Skála Skipasmiðju, 1988-92.*



*Eyðun Poulsen, nevndarlimur. Eyðun er sveisari, lært á Skála Skipasmiðju, 1982-1986.*



ALKA forsikring



# Få 103 års erfaring i store forsikrings-aftaler

ALKA forsikring blev skabt af de danske fagforeninger i 1903. Siden da har vi leveret store, kollektive forsikringsaftaler til fagforbund og store organisationer, også på Færøerne.

ALKA er anerkendt for sine kvalitetsforsikringer og gode kundeservice. I fire ud af de sidste fem år har Dansk Kunde Index kåret ALKA som forsikringsselskabet med de mest tilfredse og loyale kunder.

Kontakt os på tlf. +45 43 58 57 57 og hør mere om hvad vi kan tilbyde.

## ALKA - et anderledes forsikringsselskab

ALKA er ikke sat i verden for at lave store overskud til vores ejere, men for at tilbyde kunderne de bedst mulige forsikringer til de lavest mulige priser.



# VINDEYGUNI SIGA ALT

**HDYGD umfatar ymsar vørur:**
- vindeygu
- altanhurðar
- úthurðar

**Úr ymsum tilfari:**
- træ
- træ/alu
- plast

**Við ymsum funktiónum:**
- toppsving
- síðusving
- síðuhongd
- topphongd

**Við 10 ára trygd:**
- døgg millum rútarnar
- rotskaðum (treytað av at vit mála liðugt)
- at viðurin skjýtur seg og fer sundur í lamineringini
- funktiónsfeilum á besløgum

HDYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

REPROZ



# El-amboð til handverkaran?

# Balslev sjálvandi!



Paslode
makita
metabo
ELEKTRA BECKUM

Tel 31 11 22

www.balslev.fo

*… framhald frá síðu 27*

## Mogens Birch og Leif Waagstein

Tað varð hildið á fram við at royna at fáa ein sáttmála í lag.

Millum annað heitti felagið á Mogens Birch, landsrættarsakførara, og í juni 1963 byrjar eitt brævasamband millum hann og Leif Waagstein, landsrættarsakførara, sum umboðaði Skipasmiðjuna. Og 15. februar 1964 verður so fyrsti sáttmálin millum báðar partarnar undirskrivaður. Men hann er bert í gildi til 1. mai sama ár.

## Bók um felagið í 1986

Í 1986 gav Skála Handverkarafelag út bók um felagið. Har verður m.a. sagt soleiðis: 25 ár er eingin aldur, heldur ikki hjá einum felagi, men nevndin helt tað ikki vera heilt burtur við at steðga á og líta aftur um bak at vita, hvat fram er farið hesi 25 árini (1961-1986). Heitt var á Oluf Djurhuus um at skriva tekstin, og játtaði hann, áðrenn hálvtalað orð.

Hesi 25 árini (1961-1986) eru gott og væl 500 handverkarar vorðnir limir í felagnum, og av teimum eru umleið 160 virknir í dag (1986). Allur limalistin er prentaður aftast í hesum minningarriti. Har er eisini prentaður orðarætt – við málsligum villum – felagsins fyrsti sáttmáli.

## Bátasmiðurin Skála Páll

Sjálvt um felagið er ungt, so er handverkið í bygdini gamalt, og vit vita um nógvar hegnismenn. Kendastur er kanska Skála-Páll, sum livdi í seinnu helvt av 17. øld ella um 1700. Hann varð skrivaður Poul Poulsen ella Pol Smid og var bóndi á Ytra Skála.

Hann varð hildin at vera besti bátasmiður í sínari tíð. Nevnast kann, at tá ið Niels Zachariasen av Eiði í 1698 fekk til uppgávu at ansa eftir skipum, ið komu undir oyggjarnar, var skilað til í reglunum, hann hevði at ganga eftir, at lata Poul i Skaale gera 10-mannafarið, ið nýtt skuldi verða til vaktartænastuna.

Um Skála-Páll sigst annars, at hann hevði ásett sær ikki at smíða fleiri bátar, enn dagar vóru í árinum. Tá ið hann tí steðgaði við talið 365, rann honum til hugs, at fjórða hvørt ár var leypár og hevði 366 dagar, og gjørdi hann tí ein hálvan bát afturat.



*Nevndin í Skála handverkarafelag frá vinstru:*
*Eyðun Poulsen, Robert Jensen, Janus Uldall, Harald Østerø, Høgni Houmann.*

Hansara hegni lutaðist í arv til mangar eftirkomarar í ætt hansara, ikki minst til langabbasonin Nólsoyar-Páll.

## Eingin heppin loysn

Áðrenn hetta felag varð stovnað, vóru handverkararnir limir í Skála Arbeiðsmannafelag, men hetta var eingin heppin loysn, hvørki fyri handverkarar ella arbeiðsmenninar, við tað at áhugamálini liggja rættiliga langt frá hvørjum øðrum.

Og óivað hevur nógv verið tosað um at stovna eitt felag millum handverkarar á Skála, ella kanska eina mest millum handverkararnar á Skála Skipasmiðju.

## Fyrsti fundurin

Og leygardagin tann 21. apríl 1961 varð kallað saman til fundar at stovna Handverkarafelagið.

Ein fundur hevði verið frammanundan, har menn samdust um at velja eina fyribilsnevnd, og hevði hon gjørt fyrireikingar til fundin tann 21. apríl.

Jørgen Bech var valdur til formann í fyribilsnevndini, og á fundinum 21. apríl beyð hann fundarfólkinum vælkomnum.

Dánial Jacobsen varð valdur til orðstýrara. Síðani las Jørgin Bech eitt lógaruppskot upp, sum samsvaraði nógv við lógina hjá Havnar Handverkarafelag, men tó við ymiskum broytingum.

Atkvøtt varð síðani um uppskotið, og varð tað einmælt samtykt.

Síðani helt fundurin áfram, og biðið varð um uppskot til nevnd.

Nevndin kom at síggja soleiðis út: Jørgin Bech, formaður, Petur Pauli Mikkelsen, næstformaður, Kristian Rasmussen, Jóannes Sørensen og Jørgen Thomsen. Sum tiltakslimir vóru Alfred Christiansen og Tummas Lassen valdir.

Audi
SEAT
PORSCHE
Bilasølan
við Øssur Johannesen
Vegurin Langi - 188 Hoyvík - tlf. 31 53 54 - www.audi-vw.net




**Kamera:** 640 x 480 pixlar - Video
**Ljóð:** Mp3 - Radio - Fleirtónar
**Samband:** GPRS - EDGE
**Battarí:** Talutíð 3 til 5 tímar
-Hvílitíð 150 til 300 tímar
Telefonin hóskar til hart arbeiði

TELEBÚÐIN
Tel 30 30 40